## Beinta Háberg 60 ár

Í gjár fylti Beinta Háberg seksti ár. Dagurin verður hildin komandi leygardag í Ebenezer og øll eru hjartaliga væl komin. At dagurin verður hildin í Ebenezer er ikki tilvildarligt, tí brøðrasamkoman hevði verið fátækari, hevði Háberg navnið ikki sett sína sjónligu slóð í samkomuna. Hon er dóttir Petur og Hjørdis Háberg.

Beinta er musiskalsk, góður klaverleikari og góða røðd. Hon hevur verið virkin í tónleiki alt lívið

Beinta er gift Eiler Jacobsen, skipara og reiðara og hon hevur verið ein dyggur stuðul øll árini, meðan maðurin hevur ríkið virkið sítt framvið havsins mýrulendum og kyksendum, har alt hevur ligið í tí óvissa. Eiler hevur gjørt mangan stóra fongin gjøgnum lívið, men í endurminningunum »Skálvíksdrongur-sildakongur« skrivar hann, at størsti fongurin av øllum var, tá ið hann fekk Beintu. Hon kemur fram um stórar nóta og rækjubátar. Hon kemur fram um allar lastirnar av makreli, sild, lodnu, svartkjafti og posarækjum.

# Keramikkur og málningar í Norðurlandahúsinum

LISTAFRAMSÝNING

Leygardagin 25. august 2001 kl. 14.00 letur upp áhugaverda keramikk- og málningaframsýningin hjá systkjunum Anders og Lotte Glob.

Lotte Glob er keramikari, og verk hennara bera brá av stórum áhuga fyri náttúruni. Hetta sama er galdandi fyri bróðurin Anders Glob, sum eisini fær íblástur sín úr náttúruni og kanska einamest teimum skiftandi litum hennara.

Lotte Glob er fødd 1944 í Danmark, men hevur í mong ár búðleikast í Skotlandi. Hon hevur tikið útbúgving í m.a. Danmark, Skotlandi og Frankaríki. Hon hevur haft framsýningar í USA, New Zealandi, Skotlandi, Írlandi og Danmark.

Anders Glob er føddur í 1940 eisini í Danmark og er eisini búðsitandi har. Hann sýndi á fyrsta sinni fram í Århus 1964 og hevur síðani havt nógvar framsýningar einamest í Danmark.

Framsýningin í Norðurlandahúsinum er í húsinum til og við 23. september 2001.



*Framsýningin í Norðurlandahúsinum, sum letur upp leygardagin, er bæði ein keramikk- og málningaframsýning*




# Bridgeferð við Norrönu

**Tíðindaskriv**
*Per Kallsberg*

Aftur í ár skipa Smyril-Line og Per Kallsberg fyri bridgeferð við NORRØNU.

Hetta er 5. árið skipað verður fyri brudgetúri. Farið verður úr Havn fríggjamorgunin 24.08.2001 og komið verður aftur mánamorgun kl 06.00.

Umborð verður skipað fyri kappingum fríggja-, leygar- og sunnudag. Øll, ið duga at spæla brigde kunnu koma við til bridgeferðina. Til allar kappingar verður dentur lagdur á at hava tað hugnaligt og á túrurinum verður bridge og hugni í hásæti.

Tey, ið hava hug at koma við kunnu tekna seg hjá Smyril Line

# Aldumodel fyri Føroyaleiðina

**Tíðindaskriv**

Statoil-bólkurin, ið er samansettur av oljufeløgunum Statoil, Phillips, Enterprise og Veba, hevur latið Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya fígging til eina Phd-verkætlan um at gera eitt operativt aldumodel fyri Føroyaøkið. Hettar er ein av trimum verkætlanum, umfram stuðul til undirvísing, sum er partur av sáttmálanum, sum umboð frá Statoil-bólkinum og Náttúruvísindadeildina skrivaðu undir tann 23.01.2001.

Hetta er ein trý ára verkætlan, har endamálið er at menna eitt numeriskt operativt aldumodel fyri Føroyaøkið, umframt at royna at lýsa serlig alduviðurskifti á Føroyaleiðunum. Verkætlanin er komin lag, tí sum kunnugt hava alduviðuskiftini avgerandi ávirkan á alt virki á sjónum, og Náttúruvísindadeildin hevur sett sær sum mál at menna hetta fakøkið. Verkætlanin byggir víðari á royndirnar, sum Náttúruvísindadeildin hevur frá teldusimulering av sjóvarfallinum á landgrunninum, og er málið, at úrslitini frá simuleringunum av sjóvarfallinum skullu verða partur av nýggja aldumodellinum. Eisini er ætlanin at gagnnýta aldumátingar, sum eru gjørdar á landgrunninum seinastu árini.

Í næstum verður søkt eftir kandidati at gera arbeiðið saman við vísindastarvsliðinum á Náttúruvísindadeildini. Umsøkjarar skulu hava prógv sum cand. scient ella sivilverkfrøðingur innan viðkomandi fakøki.Tó eru tey, ið hava ávegis at gera kandidatuppgávu, eisini vælkomin at søkja, men kravt verður, at tey hava lokið prógv, áðrenn tey kunnu byrja.

Tað verður vantað at kandidaturin verður førur fyri at verja arbeiði sítt fyri Phd-grad innan fyri tíðarrammuna uppá 3 ár. Í hesum sambandi má roknast við, at viðkomandi í styttri ella longri tíðarskeiðum kemur at verða á læru- ella granskingarstovnum uttanlands.

Lýsing eftur kandidatum kemur í bløðini í heyst, men áhugaði eru longu nú vælkomin at venda sær til Náttúruvísindadeildina á tlf 315306, um teldupost á knuds@setur.fo ella at støkka inn á gólvið í Nóatúni í Tórshavn.



